

rigmor@sosialurin.fo

*Rigmor Dam*

# Tjekkað í Kunoy



LÍVSSTÍLUR: Hon er havnargenta og heilsu-freak. Leiðari og listakvinna. Livir í nú'inum og elskar lekkir klæðir.
Snøgt sagt: Ein kulan lívsstíl … Í KUNOY!









Hedvig Johansdóttir.

34 ár.

Uppvaksin á Frælsinum í Havn.

Gift við Erlingi Høgnesen, 35 ár, sivilverkfrøðingur úr Klaksvík.

Børnini eru Ronja 6 ár og Boas 5 ár.

Leiðari í Barnahúsinum Margit og í útibarnagarðinum Fjallafípan í Klaksvík.

Elskar at renna og mála.

Kann ikki liva uttan teppir, stearinljós og heimabakað.

Tosar føroyskt, danskt, enskt og spanskt.

Útbúgvin kunstpedagogur og tekur leiðsluútbúgving.

Eigur ein lítlan bil, Suzuki Swift og ein fittan gravhund.

Besti sangurin er »Í tínum trygdar-skugga« við Martin Joensen.

Postboðið bankar á dyrnar og handar henni ein stóran bjálvaðan brævbjálva við gávu í frá sviga-rinnuni í Filipsoyggjunum. Hedvig Johansdóttir takkar, letur úthurðina aftur og setist at fortelja um, hvussu tað ber til, at hon, sum havnarkona, valdi at búseta seg í Kunoy.

– At búgva her í Kunoy gevur mær frælsi at liva tað lívið, sum eg ynski. Tí eg kann ikki ganga upp á kompromis við tað, sum hevur allar størstan týdning, nevniliga góðu løturnar saman við manninum og børnunum. Hóast eg eri havnagenta, so eri eg meira náttúrumenniskja. Her í Kunoy er vakurt og friðarligt, vit eru ikki bundin av skuld, sigur Hedvig og setir koppin á San Fransisco. Undir klára voksdúkinum liggur eitt stórt heimskort og ber boð um, at hóast vit eru stødd í Kunoy, eru vit framvegis partur av alheiminum.

– Vit hava búð í Keypmannahavn, Spania og í Reykjavík. Fyri okkum hevur tað ikki so stóran týdning, hvar vit búgva, men at njóta núið, óansæð, hvar vit eru. So hetta er eitt sindur sum at búgva í summarhúsi alt árið, sigur Hedvig og fær sær eitt jarðber við myrkari sjokolátu av uppsatsinum í trimum hæddum.

Hugnaligu eittplanshúsini ovar-laga í bygdini hava eisini ein ljósan og lættan summardám, við tjaldursklippum úr homrunum í erva, smálombum í túninum og stórslignum útsýni yvir fjallaryggirnar á Borðoynni.

## VELUR TIL HELDUR ENN FRÁ

Longu sum ung avgjørdu Hedvig og Erling, hvussu tey vildu liva lívið saman.

– Eg vil ikki vera partur av materiella resinum, har eg ikki havi yvirskot til børnini ella at smílast til mannin, tá hann kemur heim, sigur Hedvig, sum heldur tað vera spennandi at seta sær eitt mál, fyri síðani at skipa lívið soleiðis, at til ber at røkka hesum máli.

– Men eg elski at fara ein túr til Havnar. At drekka ein Caffè Latte í Baresso, eta Brunch við børnunum á Hvonn ella gera kvetti í Klivanum. Eg vil kunna velja tað til, men ikki vera partur av larminum hvønn dag, sigur hon, og fær sær eitt petti av ananas av avlanga fatinum við frukt og osti.

– Fólk halda ofta, at alt er so smátt og forvitið á bygd. Men her er nógv meira privat enn á Frælsinum, har eg vaks upp. Her sær ongin inn. Børnini spæla saman í frítíðini, og eg læni sukur frá grannanum. Burtursæð frá tí, liva vit akkurát líka anonymt her sum í Hoyvík, á Nørrebro, í Spania ella í Reykjavík. Men her eru bara 10 minuttir til Klaksvíkar, ommur og abbar, arbeiði og vinfólk.